gult cyan magenta svart



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og útnyrðingi og ælingur, partvís heglingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig, um náttina niður í 1 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fyrst lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig. Sunnudagin veksur hann vindin av suðri og regn. Tað verður lýggjari.

# Slakari norðanfyri

**Fiskiskapurin hjá útróðrarbátunum norðan fyri er í minking, og summir av sunnanmonnunum, sum hava róð út á Norðhavinum, eru farnir heimaftur**

VÁRRÓÐURIN
*Edvard Joensen*

Várróðurin er farin at linka, og frammandu bátarnir norðan fyri eru farnir at fækka í sama mun, sum fiskiskapurin minkar.

Sunnudagin fóru summir av suðringunum, sum hava hildið til á Eiði í vár, suðuraftur.

Teir lótu eitt sindur ójavnt at. Hjá summum hevði verið hampiligt, meðan onkur annar segði seg ikki hava verið hepnan í vár.

Sama er hjá teimum lokalu. Fiskiskapurin hevur verið eitt sindur misjavnur, láta teir at. Onkur er tó, sum hevur gjørt tað rættiliga gott í vár og mestsum bjargað ársinntøkuni.

Ein maður, Sosialurin hitti á Eiði, segði seg hava fingið eini túsund pund upp á dagin. Hann hevði verið 30 dagar á floti í vár, og við tí prísi, sum verið hevur, helt hann ikki, at nakað var at klaga um.

Ein annar helt hinvegin, at tað hevði gingið so mikið tungt at fáa nakað í ár, at tað kundi gera tað sama, hvussu góður prísurin hevði verið. Hann nevndi einki tal, men helt fyri, at várið var mestsum púra miseydnað fyri sítt viðkomandi.

So tað er ymiskt, sum látið verður at. Tað eru tó teir, sum vilja vera við, at allir eru ikki altíð »so haltir, sum teir hinka«, og kanska vilja teir ikki siga ov nógv. Tað er so góðum líkt.

Tosið millum fólk, sum ikki hava róð út í vár, hevur dagliga verið um teir øgiligu pengar, sum útróðrarmenninir hava vunnið. Og so verður eftir gomlum føroyskum siði roknað við, at teir hava fingið eina øgiliga rúgvu.

Men so er helst ikki, heldur ein fyrrverandi útróðrarmaður norðanfyri. Hann sigur, at í grundini hevur verið lítið av fiski at fingið í mun til tað, sum var vanligt í hansara tíð fram móti nítiárunum.

Men tíbetur hevur prísurin bara verið so heilt óvanliga góður í vár, at útróðrarmenninir hava fingið pengar fyri tað, teir hava veitt.

Og kelda okkara metir eisini, at tað avgjørt hevur nakað við viðgerðina av fiskinum at gera.

Hann fer ikki av vegnum fyri at siga, at ikki fyrr enn nú eru føroyingar farnir at viðgera fisk sum matvøru. Fyri ikki so øgiliga nógvum árum síðan varð føroyskur fiskur ikki virdur meira enn tøð.

– Vit tosaðu bara um rúgvu og hugsaðu at kalla als ikki um, hvussu vit fóru við fiskinum, sigur hann og leggur aftrat, at hann veit tað av egnum royndum.



*Summir av suðringunum, sum hava verið á Eiði og róð út í vár, eru farnir suðuraftur, nú fiskiskapurin er minkaður*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷7 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 18 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 12 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 19 |
| New York | 7 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 979 hPa. í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing.




Lágtrýstið við Føroyar fer í landnyrðing og køld luft rekur eitt skifti av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/04 kl. 06[00]–03/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,6°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 22,0 mm – mált frá 02/04 kl. 06[00]–03/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 26,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. apríl: Fyrra kvarter
5. apríl: Mánin næstur jørðini
8. apríl: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. apr | 04.20 | 16.45 | 03.20 | 15.45 | 03.35 | 16.00 | 06.20 | 18.45 | 07.20 | 19.45 | 02.35 | 15.00 | 01.35 | 14.00 | 04.35 | 17.00 | 05.35 | 18.00 | 04.05 | 16.30 | 05.20 | 17.45 |
| 5. apr | 05.11 | 17.35 | 04.11 | 16.35 | 04.26 | 16.50 | 07.11 | 19.35 | 08.11 | 20.35 | 03.26 | 15.50 | 02.26 | 14.50 | 05.26 | 17.50 | 06.26 | 18.50 | 04.56 | 17.20 | 06.11 | 18.35 |
| 6. apr | 05.59 | 18.24 | 04.59 | 17.24 | 05.14 | 17.39 | 07.59 | 20.24 | 08.59 | 21.24 | 04.14 | 16.39 | 03.14 | 15.39 | 06.14 | 18.39 | 07.14 | 19.39 | 05.44 | 18.09 | 06.59 | 19.24 |
| 7. apr | 06.50 | 19.14 | 05.50 | 18.14 | 06.05 | 18.29 | 08.50 | 21.14 | 09.50 | 22.14 | 05.05 | 17.29 | 04.05 | 16.29 | 07.05 | 19.29 | 08.05 | 20.29 | 06.35 | 18.59 | 07.50 | 20.14 |